ergo.fo

VØRUR IÐ ERU GÓÐAR FYRI TEG LIKAMLIGA OG SÁLARLIGA





Nýggjasta nýggja innan massagustólar "Kom og royn hann ókeypis á Vørumessuni"



Hvílistólar

Góð ljósviðgerðar lampa

Nú nærkast tíðin, har vit mangla dagsljós, manglandi dagsljós ávirkar okkara sinnalag og orku.

Men ein dagsljóslampa kann hjálpa.

Gevur sera gott lesi og arbeiðsljós.

Vit vísa lampur og aðrar góðar vørur á messuni.

Alsamt fleiri arbeiðspláss í Føroyum, keypa dagsljóslampur til starvsfólkið. Útyvir at lampan gevur dagsljós ið kann lætta uppá lyndi og gevur meira orku, gevur lampan eitt sera gott arbeiðs og lesiljós.



Dynamo arbeiðsstólar í fleiri støddum og litum



Putnam pútan "Besta keyp 2004"



Vatninnlegg

Ergo & Hjálpartól
J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel 315 777 • Fax 315 772 •Fartel 215 778
Teldupost: ergo@ergo.fo • Heimasíða: www.ergo.fo









# Íslendskt góðgæti gongur sum heitt breyð

**Góðgæti frá tí íslendska framleiðaranum 'Móna Ehf' er við at koma fyri seg millum sjokolatu svangar føroyingar**

Tað sigst at føroyingar eta fýra ferðir so nógva sjokolatu sum sviar; enn hava vit ikki eftirkannað hesar upplýsingar, men okkurt bendir á at sjokolata er nakað sum veruliga gongur í handlum og kioskum á Klettunum.

Tað kann væl vera at íslendingar hava hoyrt um tann føroyska smakkin fyri góðgæti. Í øllum førum hevur vælsmakkandi 'Móna' sjokolata fingið alsamt fleiri føroyingar til at hugsa íslendskt tá tað um søtmeti ræður.

»Vit fingu nakrar prøvar frá Jóhannes Guðjónsson sum umboðar Mónu í Føroyum,« upplýsir Magnus Joensen frá Kjølbro Heilsølu. »Hetta vísti seg at vera ógvuliga góð produkt, so vit avgjørdu at royna tey. Marknaðurin hevur tikið sera væl ímóti produktunum og sølan hevur verið hareftir bæði í handlum og kioskum. Produktini klára dygdina væl og virðiliga og prísurin er á góðari leið.«

Millum stór hitt frá Mónu teljast 'Grænjazz' og aðrir variantar av sjokolata barrum, umframt eini 15 variantar av leysum góðgæti íroknað djóra figurar, og ikki minst 'Lottokúlur' ið eru eitt slag av lakres bommum við sjokolatu uttaná. Sum skilst verða Móna páskaregg introduserað í næstum.

## Saknaði íslendskt

Íslendingurin Jóhannes Guðjónsson kom upprunaliga til Føroya fyri umleið 10 árum síðani, um tað mundið Bónus hevði hópin av íslendskum matvørum at bjóða. Tá hann í 2001, aftan á at hava verið í Íslandi í eitt tíðarskeið, kom aftur til Føroya, var alt broytt. Tá vóru allar hesar vørur sum blástar av hillunum.

Men vónbrotið varð skjótt vent til íblástur og nýtt fyritaksemi.

»Eg helt tað líktist svarta ongum at tað ikki skuldi bera til at fáa íslendskar matvørur í Føroyum,« minnist Jóhannes Guðjónsson.

»Tað tók sína tíð at koma í gongd, men eg setti mær fyri at gera nakað við hendan trupulleika og fór í holt við at kanna møguleikarnar fyri at fáa onkra umboðan. Móna var eitt tað fyrsta eg hugsaði um, tí tað er eitt kent merki millum íslendingar… Tað eydnaðist mær at fáa umboð í Føroyum fyri allar vørur sum Móna Ehf framleiðir; eg fekk eisini samstarv við Kjølbro Heilsølu ið átók sær at marknaðarføra og distribuera Móna góðgæti her. Síðani hevur tað bara gingið betur og betur við hesum virksemi.«

Jóhannes Guðjónsson er giftur í Sandavági, har hann og konan eiga og reka Heimabakaríið. Harumframt fæst hann við at umboða íslendskar matvørur í Føroyum.